# Sá einki óvanligt



**Sven Erik Strandberg er flogskipari og basuleiðari hjá Atlantsflogi. Bert fáar minuttir áðrenn flogvanlukkuna lendi hann á flogvøllinum í Stord og við sama slagi av flogfari – BAE-146/200.**

FLOGVANLUKKA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Sambært Strandberg vóru líkindini at lenda sera góð, tá vanlukkan hendi.

Tá hann hevði fingið sítt flogfar trygt og gott á flogvøllin vendi hann sær á, og sá føroyska starvsfelaga sín í luftini við 16 ferðafólkum umborð.

Vanlukku-flogfarið fór úr Sola kl. 6:47 – sjey minuttir seinni enn ætlað. Tað skuldi millumlenda í Stord fyri at taka enn fleiri ferðafólk við.

Alt sá út til at ganga sum ætlað í eygunum á Strandberg, sum stóð og eygleiddi hvussu flogfarið nærkaðist asfaltinum á breytini.

- Hetta var ein heilt vanlig innflúgving og touchdown. Eg sá so einki óvanligt, sigur hann við VG Nett.

**Eingin trupulleiki**

Hann metti at alt gekk sum ætlað og snaraði sær síðani á. Men klokkan 7:35 kom ein flogterna rennandi og rópti um royk.

Tað vísti seg, at ein starvsfelagi hjá Strandberg hevði mist tamarhaldið á flogfarinum, sum var farið út av breytini.

Strandberg hevur sjálvur flogið við hesum flogførunum síðani 1991 og hevur aldrin havt nakrar trupulleikar við teimum.

Eftir hansara meting kundu allir flogskiparar havt lent í Stord, soleiðis sum floglíkindini vóru í morgun. Vøllurin var eitt sindur vátur, men tað var einki at tosa um.

- Tað er eingin trupulleiki at lenda uppá 500 metrar í dag, sigur hann.

Hann hevur heldur ongar møguligar frágreiðingar um, hví vanlukkan hendi.

Flogfarið brúkar hjólbremsur, spoilarar og flappar tá tað bremsar. Tað vendir ikki luftstreyminum øvugtan veg, sum onnur flogfør gera.

# Ófatiligt at slíkt hendir í fagrasta veðri

**Jørgin Gunnarsson býr í Bremnes á oynni Bømlo, sum liggur vestur um sundið ein hálvan tíma frá flogvøllinum.**
**– Tað er heilt ófatiligt, at slíkt hendir í fagrasta veðrið og í besta sýni. Her er ikki eitt skýggj á luftini og hitin liggur um 15 stig, sigur Jørgin Gunnarsson úr telefonini úr Bremnes, sum liggur sera tætt við flogvøllin Stord.**

VANLUKKA
*Rólant Waag Dam*

Tað tekur ein hálvan tíma at koyra til flogvøllin frá Bremnes, har Jørgin býr, kortini sá hann sjálvur hvørki royk ella eld har frá, sum hann býr.

– Á síðuni, vit búgva á, sóu vit onki, men á hinari síðuni, sum er ímóti flogvøllinum sóu tey nógvan royk og eld, greiðir Jørgin Gunnarsson frá, og sigur hann eisini, at nógvar av myndunum, sum eru at síggja á norskum heimasíðum frá vanlukkuni, eru tiknar av tí síðuni á oynni.

Tá Jørgin Gunnarsson hoyrdi tíðindini í morgun grunaði hann beinanvegin ilt.

– Tá eg sá tað í sjónvarpinum, hugsaði eg beinanvegin um Atlantsflog. Henda rutan teir hava flogið her, hevur verið so hent og hevur hon givið samfelagnum her nógvar møguleikar, sigur Jørgin Gunnarsson úr telefonini úr Noreg.



*Bjargingarfólk fáa eitt av skaddu ferðafólkunum á sjúkrahús*